LM-017/2020

Annika Petersen

Fra: Olaf Frits Joensen <olaf@roknskap.fo>
Sendt: 28. januar 2020 09:05
Til: VMR-Journal
Cc: Annika Petersen; Heini Thomsen (ht@januar.fo); Johannes Færø (jf@spekt.fo); 'Mark T. Højgaard'; Eli Thorsteinsson
Emne: FFG - Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) hoyringssvar frá Felagið Føroyskir Grannskoðarar
Vedhæftede filer: Hoyringssvar frá FFG til lógaruppskot um nýggja hvítvasklóg - 27.01.2020.pdf; Fylgiskriv til Hoyringssvar frá FFG til lógaruppskot um nýggja hvítvasklóg - 28.01.2020.pdf

Hey Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Viðvíkjandi "Uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvask og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)."

Vísandi til teldupost tykkara frá 9. Januar 2020 har omanfyri nevnda uppskot verður sent til hoyringar.

Nevndin í felagið Føroyskir Grannskoðarar hevur gjøgnumgingið uppskotið saman við løgfrøðinginum Eli Thorsteinsson.

Viðheft er okkara hoyringarsvar.

Eru spurningar ella ivamál eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Vinarliga / sincerely

Roknskaparfelagið

Olaf Frits Joensen
Skrásettur grannskoðari | Registered Public Accountant
Partnari & stjóri | Partner
CEO / HD-R

Tel. +298 309400
Beinl. tel. +298 309404
Mob. +298 239401
olaf@roknskap.fo
www.roknskap.fo

Roknskaparfelagið
skrásettir grannskoðarar Sp/f
J.C. Svabosgøta 48
P.O. Boks 2210
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Fra: Annika Petersen <AnnikaHenrikkaHannaP@uvmr.fo>
Til: "roknskap@roknskap.fo" <roknskap@roknskap.fo>
Dato: 09-01-2020 11:36
Emne: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) til hoyringar

---

Til Felagið Føroyskir Grannskoðarar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvasking og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) verður hervið sent tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til **hósdagin 30. januar 2020.**

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Blíðar heilsanir
Annika Petersen
Umhvørvis- og vinnumálaráðið.
[bilaget "Uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvasking og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin).docx" blev fjernet af Olaf Frits Joensen/Frits]

ETH.FO
ELI THORSTEINSSON ADVOKATUR

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Teldupostbústaður: uvmr@uvmr.fo

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)

Víst verður til hoyringgskriv frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum (UVMR) dagfest tann 10. januar 2020 við uppskotið til nýggja løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin).

Felagið Føroyskir Grannskoðarar (FFG) hevur heitt á undirritaða um at gera hoyringssvar vegna felagið til lógaruppskotið.

Innleiðing

Nevndin í FFG hevur gjøgnumgingið uppskotið saman við undirritaða og tekur sum heild undir við endamálinum við lógaruppskotinum, undir hesum at lóggávan í Føroyum má vera á sama støði sum lóggávan í okkara grannalondum, tá talan er um at íverkseta fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvasking og fígging av yvirgangi.

FFG tekur somuleiðis undir við, at lóggávan á økinum broytist frá at vera ein í høvuðsheitum reglubundin skipan til at vera ein meira váðagrundað skipan, hetta samsvarandi 4. hvítvaskdirektivinum frá ES. Hetta hevur tó aðrar avbjóðingar við sær, sum vit vilja koma nærri inn á undir viðmerkingunum til § 6, stk. 1 niðanfyri.

Innleiðandi kann eisini viðmerkjast, at lógaruppskotið í høvuðsheitum byggir á 4. hvítvaskdirektiv hjá ES frá 20. mei 2015. ES hevur tó longu samtykt 5. hvítvaskdirektiv tann 30. mei 2018, har limalondini fingu freist til at implementara broytingarnar í seinsata lagi 20. januar 2020. Tað kundi tískil verið áhugavert at fingið at vita frá UVMR, hví broytingar í 5. hvítvaskdirektivi frá ES, sum viðkoma teimum yvirtiknu málsøkjunum, ikki eru tiknar við í hesum lógaruppskotinum.

Harumframt kann nevnast, at t.d. Danmark hevur gjørt eina røð av øðrum nationalum reglum afturat implementeringini av 5. hvítvaskdirektivi.

Hóast omanfyristandi undirtøku sum heild, hevur FFG niðanfyristandandi viðmerkingar til lógaruppskotið.

§ 5 – Kontantgjaldsbann á kr. 50.000

FFG tekur undir við broytingunum í kontantgjaldsbanninum, undir hesum at markið verður sett niður frá kr. 100.000 til kr. 50.000.

Eftir lógaruppskotinum skal kontantgjaldsbannið vera galdandi fyri øll vinnurekandi undantikið vinnurekandi, sum eru fevnd av § 1, stk. 1 í lógaruppskotinum.

Tilmæli: FFG vil mæla til, at undantakið eisini verður galdandi fyri tey vinnurekandi, sum eru fevnd av § 1, stk. 1 í "Anordning om ikraftræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)", eisini nevnd hvítvaskfyriskipanin í viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið.

Áheitan: FFG vil harafturat heita á viðkomandi myndugleikar, at upplýsa vinnurekandi væl um lógarbroytingina og um kontantgjaldsbannið í síni heild.

§ 6, stk. 1 – Váðameting

Ásetingin áleggur fyritøkum fevndar av lógini, at eyðmerkja og meta um váðan fyri, at fyritøkan kann blíva misnýtt til hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Váðametingin skal gerast við støði í handilsmodellinum hjá fyritøkuni ella persóninum og skal fevna um metingina av váðafaktorum, sum eru knýttir at kundum, vørum, tænastum og transaksjónum umframt veitingarvegum og londum ella landafrøðiligum økjum, har handilsvirksemi hjá fyritøkuni er. Váðametingin skal skjalprógvast og støðugt dagførast.

Viðvíkjandi eyðmerkjan og meting av váðum verður víst til viðmerkingarnar til § 7 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið, har tað m.a. stendur fylgjandi:

> *Når en virksomhed eller person skal identificere risikofaktorer, skal virksomheden eller personen inddrage den risikovurdering, som udsendes af Europa-Kommissionen, jf. artikel 6 stk. 5, (supranational risikovurdering), samt den risikovurdering, der udsendes af Danmark (national risikovurdering), jf. artikel 7 i 4. hvidvaskdirektiv. Disse risikovurderinger vil løbende blive opdateret. Det kan yderligere være relevant at inddrage risikovurderinger udsendt af tilsynsmyndigheder i henhold til denne lov, trusselsvurderinger m.v. Der kan yderligere inddrages information fra FATF, landerapporter om f.eks. korruption, informationer fra medier samt virksomhedens eller personens egne erfaringer.*

Av hesum kann lesast, at fyritøkur fevndar av § 1, stk. 1 í lógaruppskotinum framyvir **skulu** brúka váðametingina frá Evropa-Kommisiónini (Supranational Risk Assessment, vanliga stytt SNRA) umframt váðametingina, sum Danmark letur gera (Hvidvask i Danmark – Den nationale risikovurdering), sum grundarlag tá váðafaktorar fyri einstøku fyritøkuna skulu eyðmerkjast. Báðar váðametingarnar finnast her:

https://www.finanstilsynet.dk/Tilsyn/Information-om-udvalgte-tilsynsomraader/Hvidvask/Links-vedr-hvidvask

Við **SNRA** er talan um eina stutta frágreiðing á umleið 20 síður við umfatandi fylgiskjølum á áleið 280 síður, sum saman skal geva eina váðamynd av hóttanarstøðinum í ES í mun til hvítvasking og fígging av yvirgangi.

Talan er um eina stóra og umfatandi frágreiðing, sum er torfør hjá ikki serfrøðingum á økinum at fara í holt við. Tí kann tað vera ein avbjóðing, serliga hjá smærri fyritøkum at brúka frágreiðingina. Harnæst má stórt spurnartekin setast við, hvussu viðkomandi frágreiðingin er fyri føroyskar fyritøkur, tá Føroyar sum kunnugt ikki eru partur av ES.

Tilmæli: FFG vil tískil mæla til, at SNRA ikki verður ein tvungin partur av grundarlagnum hjá føroyskum fyritøkum, tá hesar skulu gera sínar váðametingar sbrt. § 6, stk. 1.

Við váðametingini hjá SØIK "**Hvidvask i Danmark – Den nationale risikovurdering 2018**", sum er tann nýggjasta, kann ein lesa um metingar av váðum fyri hvítvasking og eyðmerkingum av váðaøkjum, sum eru serliga útsett fyri at blíva brúkt til hvítvasking. Váðametingin fevnur eisini um bæði Føroyar og Grønland, sjálvt um hetta ikki er serliga sjónligt tá ein lesur váðametingina

Víst verður til samstarvsskjalið hjá Dansk HvidvaskForum frá 17. november 2016, sum er at finna her: https://www.finanstilsynet.dk/Tilsyn/Information-om-udvalgte-tilsynsomraader/Hvidvask/Meddelelser/Samarbejdsaftale

Har stendur m.a. fylgjandi undir brotinum "Aftaleparter":

> *De relevante grønlandske og færøske myndigheder vil løbende blive inddraget i arbejdet i Dansk HvidvaskForum, hvor dette vurderes relevant. Dette gælder i særdeleshed for de områder, hvor Færøerne og Grønland har hjemtaget kompetencen.*

Víðari viðvíkjandi váðametingum stendur:

> *Dansk HvidvaskForum skal vurdere, hvorvidt der bør udarbejdes særegne risikovurderinger for Grønland og Færøerne, eller om disse geografiske områder, som i dag fortsat skal indgå i den samlede nationale risikovurdering.*

Áhugavert hevði verið at vita um føroyskir myndugleikar yvirhøvur ella í hvønn mun føroyskir myndugleikar eru við í arbeiðinum í Dansk HvidvaskForum, undir hesum hvørjar grundgevingarnar hava verið higartil, fyri ikki at gera serstakar váðametingar av Føroyum.

Tá øll tann nýggja hvítvasklóggávan í Føroyum, bæði í hvítvaskfyriskipanini frá í fjør og í hesum lógaruppskotinum, nú í nógv størri mun skal grundast á eina váðatilgongd ístaðin fyri eina reglugrundaða tilgongd, so er umráðandi at grundarlagið undir hesari tilgongd er so nøktandi fyri føroyskar fyritøkur sum gjørligt.

FFG er av tí fatan, at tørvur avgjørt er á eini serstakari váðameting av Føroyum, soleiðis at føroyskar fyritøkur og føroyskir myndugleikar hava eitt meira viðkomandi grundarlag at arbeiða út frá og harvið lættari kunnu málrætta sín innsats á økinum.

Yvirskipað sæð er tað eisini fatanin hjá FFG, at vit í Føroyum reint formelt vita ov lítið um og í hvønn mun Føroyar og føroyskar fyritøkur eru útsettar fyri at blíva brúktar til hvítvasking. Ein serstøk váðameting av Føroyum hevði bøtt munandi um hesa støðuna.

Afturat hesum kann nevnast sum grundgeving fyri, at serstøk váðameting eigur at vera gjørd av Føroyum, at Føroyar og Danmark á eini rað av økjum mugu metast at vera tvey sera ymisk samfeløg. Hetta m.a. tá tað kemur til altjóða handil, undir hesum handilsavtalur/forðingar, slag og vav av kriminaliteti, talgildar

gjaldsloysnir og í ein ávísan mun eisini lóggávuna í londunum báðum. Tí er nærliggjandi at hugsa, at váðaprofilurin hjá Føroyum er ein heilt annar enn tann hjá Danmark.

Tilmæli: FFG vil tí mæla føroysku myndugleikunum til, at taka málið um eina serstaka váðameting av Føroyum upp við danskar myndugleikar og fáa hesa gjørda, soleiðis at føroyskar fyritøkur fevndar av hvítvasklóggávuni fáa eitt betri og eitt meira viðkomandi grundarlag at arbeiða út frá, samstundis sum fyritøkurnar lættari kunnu málrætta sín innsats á økinum. Hetta hava føroyskir myndugleikar møguleika fyri at fáa í lag í samstarvinum Dansk HvidvaskForum, sum víst á omanfyri.

§ 10, stk. 1, nr. 1 b - V-tal

Tilmæli: Mælt verður til at brúka V-talið ístaðin fyri skrásetingarnummarið í § 10, stk. 1, nr. 1 b.

Hetta er somuleiðis tað sum lagt er upp til í viðmerkingunum til lógargreinina í lógaruppskotinum og sum annars er galdandi í hvítvaskfyriskipanini.

§ 17, stk. 7 – Yvirlit frá landstýrismanninum yvir politiskt ábærar persónar

Víst verður til allýsingina í § 2, nr. 8 har allýsingin av politiskt ábærum persónum er víðkað soleiðis, at hon eisini fevnur um politiskt ábærar persónar búsitandi her á landi.

Tað at allýsingin av persónbólkinum politiskt ábærir persónar í uppskotinum verður víðka til eisini at fevna um politiskt ábærar persónar her á landi, viðførur eina røð av nýggjum mannagongdum, uppgávum og herdum krøvum fyri tær fyritøkur, sum er fevndar av lógini.

Fyritøkurnar fáa ikki bert aðrar og herdar skyldur tá talan er um kundasamband við persónar, sum eru politiskt ábærir. Hetta verður somuleiðis galdandi tá talan er um kundasamband við **nærstandandi** til politiskt ábærar persónar, tvs. t.d. ein hjúnafelagi, skrásettur maki, samlivi, foreldur, børn og teirra hjúnafelagar, skrásettu makar og samlivar, og tá talan er um **tættar samstarvsfelagar** (sí lýsing í § 2, nr. 7).

Tí kann hugsast, at samlaði persónsbólkurin tá umræður bæði politiskt ábærar persónar, teirra nærstandandi og teirra tættu samstarvsfelagar, verður lutfalsliga stórur her í Føroyum í mun til onnur lond.

Tilmæli/Áheitan: FFG metur tað tí hava stóran týdning, at yvirlitið sbrt. § 17, stk. 7 í lógaruppskotinum yvir politisk ábærar persónar her á landi er klárt og tøkt í so góðari tíð sum gjørligt, áðrenn lógin kemur í gildi. Hetta soleiðis at fyritøkur fevndar av lógini kunnu fyrireika seg so væl sum gjørligt til herdu krøvini áðrenn lógin kemur í gildi. Harumframt er tað umráðandi, at yvirlitið verður dagført so hvørt broytingar henda.

§§ 32 – Whistleblowerskipan

Ásetingin inniheldur krav um innanhýsis whistleblowerskipanir í fyritøkum fevndar av § 1, stk. 1, nr. 6-10, undir hesum eisini grannskoðarafyritøkum, tá fyritøkan hevur fleiri enn 5 starvsfólk.

Krøvini til tílíka whistleblowerskipan eru, at starvsfólk gjøgnum eina **serliga óhefta** og **sjálvstøðuga** rás kunnu fráboða brot ella møgulig brot á hvítvasklógina og reglur, givnar sambært henni. Harumframt skulu fráboðanir til skipanina kunna latast **ónavngivnar**.

Kravið um at rásin skal vera **serlig**, merkir sambært viðmerkingunum til hvítvaskfyriskipanina m.a., at rásin skal góðkennast av Dátueftirlitinum.

Krøvini um at rásin harumframt skal vera **óheft** og **sjálvstøðug**, merkja, at tað skal gerast ein sjálvstøðug funktión, sum er óheft av tí dagligu leiðsluni, og har fráboðanir kunnu latast uttanum tær vanligu kanalirnar, t.d. beinleiðis til deildina ella starvsfólkið, sum viðgerð fráboðanirnar.

Tað at fráboðanir skulu kunna latast **ónavngivnar** inniber, at tann sum fráboðar eitt møguligt lógarbrot gjøgnum rásina, skal kunna gera hetta fullkomiliga dulnevnt, t.d. við einari loysn á intranetinum hjá fyritøkuni, har fráboðanir kunnu sendast uttan at fráboðarin skal upplýsa navn, uttan møguleika fyri at spora IP-bústað osv.

FFG vil gera vart við, at fyri eina lítla fyritøku við t.d. 6-10 starvsfólkum, so vil eitt tílíkt krav um innanhýsis whistleblowerskipan viðføra eyka umsitingarligar og fíggjarligar byrðar. FFG er eisini av tí fatan at tað í flestum førum vil vera endamálsleyst at stovna tílíkar skipanir í so smáum fyritøkum.

Harnæst vil FFG viðmerkja, at markið á 5 starvsfólk hvørki sæst í viðmerkingunum til hvítvaskfyriskipanina ella av grein 61, stk. 3 í 4. hvítvaskdirektivinum frá ES.

Tilmæli: FFG vil tí mæla til, at markið fyri nær ein vinnureknandi, sum er fevndur av § 1 stk. 1, nr. 6-10 í lógaruppskotinum, skal hava innanhýsis eina whistleblowerskipan, verður hækka munandi.

Afturvið einari hækkan av markinum, kann ein líknandi uttanhýsis whistleblowerskipan setast á stovn hjá viðkomandi myndugleikum. Hetta í tráð við grein 61, stk. 1 í 4. hvítvaskdirektivinum frá ES.

§ 54, stk. 1 - Samstarvsbólkur

§ 54, stk. 1 í lógaruppskotinum er soljóðandi:

> *Landsstýrismaðurin kann seta ein bólk við luttøku av eftirlitsmyndugleikunum sambært hesi lóg. Hesin bólkur skal samskipa váðametingarnar og almennu tiltøkini móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi hjá myndugleikunum.*

FFG er av tí fatan, at tað kann vera skilagott at hava eitt tílíkt formelt myndugleikaforum, men má seta spurnartekin við hvat nærri skal skiljast við, at "hesin bólkur skal samskipa váðametingarnar..."?

Sum víst á í viðgerðini av váðametingum undir § 6, stk. 1 omanfyri, so er tað danski politimyndugleikin umvegis SØIK (Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet), sum í dag stendur fyri at gera tí nationalu váðametingina, sum Føroyar eisini eru ein partur av.

§ 60 – Gildiskoma

Eftir ætlan skal lógin koma í gildi 1. juli 2020.

FFG metur tað vera óheppið at seta so stórar broytingar í gildi, sum talan er um við lógaruppskotinum, um tað mundi tá talan vanliga er um hægstu feriutíð í Føroyum.

Harnæst er tíðarskeiðið upp til 1. juli vanliga eitt tíðarskeið, har nógv er at gera hjá grannskoðarafyritøkum. Tískil er ivasamt hvussu væl hesar fáa fyrireika seg til herdu krøvini áðrenn lógin kemur í gildi, um gildiskoman ikki verður útsett.

Harafturat verður tað mett heldur ivasamt um tað, eftir fatanini hjá FFG, neyðuga fyrireikandi arbeiði frá myndugleikunum er liðugt í nóg góðari tíð áðrenn 1. juli 2020. Sí nærri niðanfyri.

Tilmæli: FFG vil tí mæla til, at gildiskomudagurin verður útsettur til 1. januar 2021, soleiðis at fyritøkurnar fáa betri stundir at fyrireika seg til nýggju og herdu krøvini.

Aðrar viðmerkingar – Eigaraskrá

FFG hevur fyrr, í sambandi við broytingar í Vinnufelagalógini, í hoyringsskrivi tann 12. februar 2019 (løgtingsmál nr. 147/2018) gjørt vart við, at ongin almenn eigaraskrá er tøk enn hjá Skráseting Føroya til at skráseta upplýsingar sbrt. §§ 58 og 58a í Vinnufelagalógini. Hetta eru upplýsingar viðvíkjandi legalum og veruligum eigarum av vinnufeløgum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðmerkti tá til svarið hjá FFG fylgjandi:

> *§ 58 í galdandi lóg er ikki sett í gildi, tí eigaraskráin ikki er gjørd. Heldur ikki ásetingarnar í hesum uppskotinum um skráseting av veruligum eigarum verða settar i gildi fyrr enn skráin er gjørd. Skráseting Føroya er við í grundardátuverkætlanini hjá Talgildu Føroyum. Ein liður í hesi verkætlan er at gera eina almenna virkisskrá yvir allar eindir í Føroyum (kann samanlíknast við CVR-registeret í Danmark). Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at gera eina eigaraskrá, har bæði løgligir (legalir) og veruligir eigarar skulu skrásetast.*

FFG kunnugt er onki broytt hesum viðvíkjandi og ongin eigaraskrá er tøk enn hjá Skráseting Føroya.

Hartil vil FFG minna á, at tað longu nú eru fleiri ár síðani (ár 2012), at § 74 í ársroknskaparlógini bleiv strikað, sum fylgja av tá nýggjum ásetingum í uppskoti til Vinnufelagalógina um eigaraskrá hjá Skráseting Føroya.

Strikanin av § 74 í ársroknskaparlógini (viðv. krav um upplýsingar í ársfrásøgnini um stórpartaeigarar) samstundis sum, at eigaraskráin framvegis ikki er tøk hjá Skráseting Føroya, hevur eftir fatanini hjá FFG viðført, at gjøgnumskygnið við eigaraviðurskiftum í føroyskum vinnufeløgum er versnað seinastu árini.

Tilmæli: FFG vil tí mæla til, at arbeiðið við at gera eina almenna eigaraskrá á Skráseting Føroya fyri bæði legalar og veruligar eigarar fær hægstu raðfesting. Tað er umráðandi nú hvítvasklóggávan verður herd, at tað almenna eisini livur upp til sín part og veitur tey neyðugu amboðini til føroyskar fyritøkur fevndar av hvítvasklógini, undir hesum eigaraskránna.

Bæði peningastovnar, tryggingarfeløg, grannskoðarar, advokatar og aðrir aktørar hava í dag skyldu til m.a. at fáa til vega og goyma skjalprógv fyri m.a. eigara- og ræðisviðurskiftunum hjá teirra kundum. Hesir aktørar brúka allir í dag stóra orku, hvør í sínum lagi, uppá at fáa til vega og goyma skjalprógv fyri m.a. eigara- og ræðisviðurskiftunum hjá teirra kundum.

ETH.FO
ELI THORSTEINSSON ADVOKATUR

Við einari almennari eigaraskrá fyri bæði legalar og veruligar eigarar er møguleiki fyri at lætta munandi um hjá øllum teimum, sum eru fevnd av hvítvasklóggávuni í dag. Tað er tó avgerandi at skrásetingarnar í tílíkari eigaraskrá eru álítandi og at eftirlit javnan fer fram við rættleikanum av skrásetingunum í skránni.

Aðrar viðmerkingar – viðurskifti at fáa uppá plass áðrenn gildiskomu

At enda vil FFG endurtaka týdningin av at ávís viðurskifti eru komin uppá plass áðrenn lógin kemur í gildi.

FFG metir tað umráðandi, at fylgjandi er tøkt í góðari tíð áðrenn lógin kemur í gildi:

- Yvirlit frá landsstýrismanninum yvir politiskt ábærar persónar
- Eigaraskrá hjá Skráseting Føroya fyri legalar og veruligar eigarar

Harumframt er ynskiligt, at ein serstøk váðameting av Føroyum verður gjørd, um ikki áðrenn lógin kemur í gildi, so skjótast til ber aftaná hon er komin í gildi.

Málsligar viðmerkingar

Orðini "av vinningi" eiga at strikast í heitinum á lógini, soleiðis at lógin kemur at eita *Løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin).*

Vit hava annars lagt til merkis, at ymiskar slagvillur og aðrar villur eru í lógaruppskotinum og í viðmerkingunum til uppskotið.

Tilmæli: FFG vil tí mæla til, at lógaruppskotið við viðmerkingum verður lagt til rættlestur.

Spurningar og ivamál

Undirritaði er tøkur til at greiða nærri frá viðmerkingunum omanfyri um spurningar ella ivamál eru frá UVMR ella um nevndarviðgerðin í Løgtinginum krevur tað.

Vegna Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Tórshavn tann 27. januar 2020

Eli Thorsteinsson

Eli Thorsteinsson

Advokatur

eth@eth.fo / fartlf.nr. 590989

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Umhvørvis- og vinnumálráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 Tórshavn

B20202801 hoyring UVMR Hvítvask
Tórshavn, hin 28.01.2020

Viðvíkjandi "Uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvask og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)."

Vísandi til teldupost tykkara frá 9. Januar 2020 har omanfyri nevnda uppskot verður sent til hoyringar.

Nevndin í FFG hevur gjøgnumgingið uppskotið saman við løgfrøðinginum Eli Thorsteinsson.

Viðheft er okkara hoyringarsvar.

Eru spurningar ella ivamál eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Við heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Olaf Frits Joensen	Heini Thomsen	Jóhannes Færø	Mark T. Højgaard
formaður	næstformaður	peningarøkil	skrivari